UTTAN ÚR HEIMI

## Biðja USA veita trygd

Ísraelska stjórnin hevur biðið USA veita landinum bankatrygd fyri 74 milliardum krónum.

Ísrael fekk í síðstu viku 16 milliardir krónur úr USA til hernaðarlig endamál umframt eina ókenda upphædd til sivil endamál. Men tað er ikki nóg mikið, og tí hevur stjórnin hjá Ariel Sharon nú biðið USA um bankatrygd. Grundgevingin hjá Ísrael er, at landið hevur havt ovurstórar útreiðslur av herferðunum í teimum palestinsku økjunum.

Ísraelska áheitanin varð løgd fram á einum fundi í Washington mánadagin, tá tvey umboð fyri stjórnina hittu trygdarráðgevan Condoleezzu Rice, trygdarráðgeva hjá George W. Bush, forseta. Bush hevur fyrr sagt, at USA er til reiðar at veita Ísrael tann neyðuga stuðulin til tess at tryggja landsins trygd.

## 5 mill. í endurgjaldi

Tað gjørdist norska sjónvarpinum TV2 ein dýr søga, tá støðin í síðstu viku legði fleiri av teimum fremstu norsku skíð- og skoyturennarunum undir at hava nýtt dopingevni á olympiskum vetrarleikum.

Skuldsetingin fekk øði í norska ítróttarheimin, og hóast TV2 fleiri ferðir bað um umbering fyri skuldsetingina, var tað ikki nóg mikið. Mánadagin var drúgvur fundur millum umboð fyri ítróttarfólkini og sjónvarpið, og hann endaði við, at TV2 játtaði at rinda fimm milliónir krónur í bót ella sum eitt slag av einum endurgjaldi.

Umboðsmaðurin hjá ítróttarfólkunum segði aftan á fundin, at í einum máli sum hesum eru øll taparan og serliga tey ítróttarfólkini, sum høvdu skuldsetingina hangandi oman á sær. Millum teirra, sum vórðu løgd undir at hava nýtt doping, eru so kend ítróttarfólk sum skíðrennararnirVegard Ulvang og Bjørn Dæhlie og skoyturennarin Johan Olav Koss.

## Segði seg vera deyðan

Á heysti í fjør leitaði amerikanska løgreglan eftir tí 28 ára gamla Steven Chin Leung, tí hann hevði nýtt falskt pass. Tá hann frætti um atsóknina at World Trade Center, gjørdi hann av at melda seg deyðan í atsókníni fyri á tann hátt at sleppa undan lógarinnar langa armi eina ferð med alla.

Tað eydnaðist honum at sannføra ein sakførara um, at hann var bróður Steven Chin Leung, og at hesin var deyður í World Trade Center, men tá myndugleikarnir seinnu fóru at eftirkana yvirlitið yvir tey deyðu, komu teir eftir, at alt ruggaði ikki rætt við Steven Chin Leung.

Herfyri varð hann tikin, og mánadagin varð hann dømdur fýra ára fongsul fyri royndina at snýta myndugleikarnar.

## 13 deyð í Kolombia

Kolombiski stjórnarherurin kunngjørdi í gjár, at hann misti 13 menn í einum samanbresti við ta vinstrasinnaðu rørsluna FARC mánadagin.

Sambært myndugleikunum doyðu teir trettan hermenninir, tá deild teirra varð álopin av FARC-monnum 27 kilometrar í landnyrðing úr høvuðsstaðnum Bogota. Tíggju aðrir hermenn vórðu særdir. Einki varð sagt um, hvussu nógvir FARC-menn doyðu.

Hetta er ringasti ósigurin hjá herinum, síðani Alvaro Uribe tók við sum forseti í august. Undir valstríðnum lovaði forsetin, at herurin fór at herða átøkini ímóti FARC og øðrum uppreistrarfelagsskapum, sum hava herjað í Kolombia seinastu 38 árini. Fyri einum ári síðani mundi tað eydnast táverandi stjórnini at fáa eina friðarsáttmála við FARC, men royndin miseydnaðist, tá tann vinstrasinnaða rørslan tók seg burtur úr samráðingunum í evstu løtu.

# Irak fær framvegis vápn úr Evropa

**Júst sum vápnaeftirlitsmenninir hjá ST fara til arbeiðis í Irak, er tað komið fram, at lond í Mið- og Eysturevropa halda fram við at selja irakum vápn**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*



*Teir fyrstu vápnaeftirlitsmenninir hjá ST komu til Bagdad mánadagin, og í dag fara teir til arbeiðis*

*Mynd: Reuters*

Viðurkenda bretska blaðið The Guardian skrivaði mánadagin, at Serbia er miðstøð fyri ólógligari vápnasølu til Irak. Blaðið sigur seg hava tíðindini frá kanningum hjá bólkinum International Crises Group og frá vesturlendskum diplomatum.

Sambært kanningini hjá ICG hava irakar keypt vápn úr sjey londum á Balkan og í gamla Sovjetsamveldinum, og kanningin bendir eisini á, at vápnasølan er vaksin, síðani Slobodan Milosevic varð koyrdur frá fyri tveimum árum síðani.

Kanningin sigur, at felagið Jugoimport samskipar vápnahandilin, og at felagið hevur virkað fyri at selja irakum vápn úr Bosnia, Ukraina, Russlandi og møguliga eisini úr Makedonia og Hvítarusslandi. The Guardian skrivar frá vesturlendskum diplomatum, at handilin hevur verið veksandi í ár.

Ein av diplomatunum sigur við blaðið, at fleiri vápnafyritøkur í Jugoslavia hava samskipað vápnasølu til Irak, og at vápnini eru fyrst send til Sýrialands og haðani víðari til Irak. Eitt skjal, sum ICG hevur fingið hendur á, vísir, at bara Jugoslavia hevur selt Irak vápn fyri einar 860 milliónir krónur.

### Veit einki

Jugoslaviski forsetin, Vojislav Kostunica, sigur, at hann veit einki um slíkan vápnahandil, men eitt skjal avdúkar, at jugoslaviska uttanríkisráðið í januar í ár ávaraði stjórnina hjá Kostunica um, at tað kundi vera vandamikið at selja Irak vápn. Kortini valdi stjórnin at lata standa til, sigur ICG.

Sjálvt um fleiri lond í Mið- og Eysturevropa verða løgd undir at hava selt irakum vápn, er tað serliga Serbia, sum stendur fyri skotum frá Vesturheiminum. Orsøkin er, at serbar hava royndir frá amerikansku bumbuálopunum har í 1999, og harafturat kunnu onnur lond fáa gagn av tí serbiska handilskervinum, tá tað snýr seg um at útvega irakum vápn, hóast hetta er ólógligt sambært ST-samtyktunum.

# Danir væl nøgdir við ES-formansskapin

**Flestu danir halda, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri hevur gjørt eitt gott arbeiði sum ES-formaður**

DANMARK
*Árni Joensen*



*Anders Fogh Rasmussen. Flestu danir halda, at hann hevur megnað formanstarvið í ES væl.*

Ein meiningakanning í Danmark vísir, at danir yvirhøvur eru av teirri uppfatan, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri og ráðharrar hansara hava gjørt eitt gott arbeiði, síðani Danmark tók við formansskapinum í ES í summar.

70 prosent av teimum spurdu siga, at ráðharrarnir hava loyst formansuppgávuna væl. Bert fýra prosent siga tað øvugta.

22 prosent halda, at Danmark hevur loyst uppgávuna sum formansland sera væl, og 48 prosent siga seg vera nøgd við gongdina. Bara trý prosent halda, at tað hevur gingið illa, og eitt prosent siga, at tað hevur gingið sera illa.

Samanborið við eina kanning fyri tveimum mánaðum síðanieru tað munandi fleiri, sum nú siga stjórnina hava gjørt eitt gott arbeiði. Í Keypmannahavn verður hildið, at hetta kemst helst av tí góða úrslitinum á toppfundinum í Bruxelles fyri einum mánað síðani. Tá samdust leiðararnir í teimum 15 ES-londunum um tað búskaparliga grundarlagið fyri, at tíggju nýggj limalond koma upp í samvaldið í 2004.

ítróttur

Nr. 228 • mikudagur • 27. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# B36 spennir seg út

**Tríggir leikarar við til samans 88 landsdystum á baki verða eftir øllum at døma nýggir í B36 búnanum komandi kappingarárið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir meistaraheitið í 2001 var tað helst eingin loyna, at tey í B36 ikki vóru nøgd um fimta plássið, sum besta manslið teirra vann sær í landskappingini í ár. Og líkt er eisini til, at leiðslan í felagnum hevur gjørt av, at komandi ár skal gerast betri. Og teir hava so eisini gjørt nakað við málið.

Enn hevur ikki verið gjørligt at fáa tíðindini váttað frá hvørki leikarunum sjálvum ella leiðsluni í B36, men sambært keldum okkara er eingin ivi. B36 fær tríggjar nýggjar leikarar í landsliðsflokki í hópin til komandi kappingarár.

### Nýggir og tó

»Nýggir« er kanska dekan ov nógv sagt, tí talan er í øllum trimum førum um leikarar, sum áður hava roynt seg í B36.

Allan Mørkøre byrjaði kappingarárið, 1994, í árstalsfelagnum, men steðgurin ta ferðina gjørdist ikki so drúgvir. Umstøðurnar kring arbeiði og venjing gjørdu, at hann longu eftir summarsteðgin var aftur at síggja í Klaksvík, og síðani hevur hann sum kunnugt roynt seg í HB og íslendska ÍBV, áðrenn hann í fjør aftur var at síggja í KÍ. Seinasta árið hevur Allan Mørkøre ikki verið partur av føroyska landsliðshópinum, men við 54 landsdystum og einum landsliðsmálið telist hann millum mest royndu føroysku landsliðsleikararnar yvirhøvur. Sostatt eru tað bert Óli Johannesen (59 dystir) og Jens Martin Knudsen (56), sum kunnuu breggja sær av at eiga fleiri landsdystir á kontini.

Pól Thorsteinsson hevur síðani 1997 verið fastur fúsur á føroyska A-landsliðnum, tá hann hevur verið tøkur, og tó at venjari og spælskipan eru broytt, tykist hann framvegis eiga sín fasta sess á vøllinum. Eftir at hann øll síni fyrstu fótbóltsár hevði leikt í VB, skifti hann í 1998 til B36, har hann spældi í tvey ár. Í 2000 leikti hann við íslendska Valur, og í 2001 var hann við á liðnum hjá B36, sum vann greipuna. Í fjør var hann partur av NSÍ liðnum, sum við Løgmanssteypinum og silvurmerkinum í landskappingini vann sítt besta úrslit nakrantíð. Og í ár gongur leiðin so eftir øllum at døma til B36. Í alt hevur Pól verið 25 ferðir á føroyska landsliðnum.

Og so er eisini líkt til, at Heðin á Lakjuni verður í hvíta búnanum komandi kappingarár. Hann var eisini við í 2001, tá hann skeyt málið móti HB, sum tryggjaði B36 greipuna, men annars hevur hann øll fótbóltsárinin verið í KÍ. Gjøgnumbrotið á landsliðnum hevur hann enn ikki fingið, men seinnu árini hevur hann verið fastur í hópinum, og í alt er talan blivin um níggju dystir í føroyska landsliðsbúnanum

### Stjørnuhópur

Sum sagt, so er talan framvegis um óváttað tíðindi, men eru hesi sonn – og tað bendir alt á at tey eru – so verður talan um eina sanna stjørnuparadu í B36-leguni komandi kappingarár.

Treytað av, at talan ikki verður um frágongd av nøkrum av avgjørdu lyklaleikarunum, so verður talan um níggju leikarar, sum eru ella hava verið partur av føroyska landsliðshópinum, og tað man vera sjáldan – um nakran tíð - at ein venjari kemur at hava slíka breidd í hópinum, sum Ion Geolgau eftur øllum at døma fer at hava komandi kappingarár.

Teir níggju leikararnir, sum sipað verður til, eru Allan Mørkøre (54 dystir/1 mál), Julian Johnsson (47/2), Jens Kristian Hansen (44/3), John Petersen 43/5), Pól Thorseinsson (25/0), Jákup á Borg (24/0), Heðin á Lakjuni (9/0), Arnbjørn Danielsen (7/0) og Klæmint Matras (1/0). Altso ein samlaður hópur á níggju mans við 254 landsdystum og 11 landsliðsmálum.

B36 hevði aðalfund eftir evstamark okkara týsdagin, og væntandi skuldi okkurt nýtt verið at hoyrt um hetta til ta tíð.



*Heðin á Lakjuni, Pól Thorsteinsson og Allan Mørkøre verða eftir øllum at døma at síggja á einum stjørnusettum B36-liði komandi kappingarár*

# Holmstrøm og Todi tosa aftur saman fríggjadagin

**John Faxe Jensen blásti í gjár nýtt lív í danska fótbóltspráið, tá ið hann avgjørt ikki vildi ganga við til, at FCK hevur tikið spenningin úr kappingini**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Todi Jónsson hevur ikki enn skrivað undir nýggjan sáttmála við FCK. Eftir venjingina mánadagin var Todi á fundi við Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóran í FCK, men einki ítøkiligt spurdist burturúr.

– Vit tosaðu saman, og vit eru samdir um at halda fram við samstarvinum. Men einki ítøkiligt kom burturúr uttan tað, at vit gjørdu av at hittast aftur fríggjadagin, sigur Todi Jónsson á heimasíðuni todi.fo.

Einki verður sagt um orsøkina til, at sáttmáli ikki varð undirskrivaður mánadagin. Men tað ber til at ímynda sær, at teir hava togast eitt sindur um treytirnar fyri samstarvinum. Tað vil millum annað siga lønina og tíðarskeiðið, sum sáttmálin skal fevna um.

### Nýtt lív í

John Faxe Jensen, sum er hjálparvenjari í Brøndby, kveikti í gjár nýtt lív í danska fótbóltstosið. Seinasta umfarið undan vetrarsteðginum verður nú sunnudagin. Undan átjanda umfarinum hevur BT spurt venjararnar hjá feløgunum í superliguni, hvør teir rokna við fer at standa við gullkrónunum, tá ið tey 33 umførini eru spæld. Mest sum allir venjararnir taka tað meiri ella minni fyri givið, at tað verður FCK, sum verður meistari.

Men hjálparvenjarin hjá Brøndby er ikki samdur. Hann vísir á, at Brøndby í vár skal spæla tvær ferðir ímóti FCK. Og um teir vinna báðar dystirnar, so verður munurin bara trý stig, og tað heldur hann ikki vera nakað at tosa um.

Faxe leggur afturat, at hann heldur FCK spæla keðiligan og verjukendan fótbólt. FCK hevur oftast átta spælarar í verjuni, og tað er ikki so undirhaldandi sum tann mátin, sum Brøndby spælir fótbólt, heldur John Faxe Jensen.

Hans Backe, venjarin hjá FCK, vil ikki gera viðmerkingar til bersøgnu og provokerandi útsøgnina hjá John Faxe Jensen.